## Gamal hvalur

Grindamenn í Alaska gjørdust ikki sørt kløkkir, tá teir fyri nøkrum døgum síðani funnu oddin á einari harpun í einum stórhvali, sum teir júst høvdu veitt. Kanningar vístu, at oddurin er meiri enn 100 ára gamal, og at hann hevur sitið í hvalinum síðani eina ferð í 1890-árunum. Granskarar hava ofta havt ilt við at staðfesta aldurin á stórhvali, men hesaferð halda teir, at grønlandshvalurin við oddinum er millum 115 og 130 ára gamal.



## Arbeiða uppá bingjuhavnina

Kollfirðingar hava í fleiri umførum víst sína ónøgd við bingjuhavnina, sum Tórshavnar kommuna hevur ætlað at gjørt á Oyrareingjum, men nú er arbeiði uppá bingjuhavnina byrjað. J&K Petersen er farið í holt við at rudda økið á Oyrareingjum, sum ætlandi skal nýtast til goymslupláss. Hetta sigur heimasíðan, www.torshavn.fo. Ein boriflaki hjá J&K Petersen er eisini komin at liggja út fyri ífyllingini, og Leivur Hansen, formaður í havnarnevndini hjá Tórshavnar kommunu, sigur, at økið skal bæði slættast og asfalterast. Bleyti botnurin út fyri ætlaðu atløgusíðuni skal eisini reinsast, so bleyta tilfarið verður ført eystur millum Stong og Eystnes, har tað verður slept aftur.



*Hans Laksá verður nýggjur stjóri í grannskoðaravirkinum Rasmussen & Weihe frá fyrsta juli í ár at rokna*

# Klaus selt Rasmussen & Weihe

**Eg havi sum aðalmál, at har er eri, skal eg vera fult og heilt. Og har eg fari úr, fari eg úr fult og heilt, sigur Klaus Rasmussen um avgerð sína, at selja fyritøkuna til starvsfólkið**

EIGARASKIFTI

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Nú skal Klaus Rasmussen, statsautoriseraður grannskoðari, royna nýggjar leiðir. 1. juli fer grannskoðaravirkið, sum hann eigur meginpartin av, í summarfrí.

Ella rættari sagt: átti meginpartin av. Tí í sambandi við, at Klaus við familju flytir til Danmarkar í summar, fer hann frá sum stjóri í felagnum, samstundis sum hann hevur selt sín part í fyritøkuni.

– Eg havi hugsað um hetta í eina drúgva tíð, men so leingi sum eg var einasti statsautoriseraði grannskoðari í virkinum, bar jú ikki til at fara nakran veg. Nú er Hans Laksá útbúgving sum statsautoriseraður grannskoðari, so nú er stundin komin, sigur Klaus Rasmussen.

Klaus kom til Føroya fyri 25 árum síðani sum nýútbúgvin cand.polit, og Carl Wilhelm Weihe, var einasta fyritøka, sum vildi geva honum starv, sum Klaus sjálvur málber seg. Men har hevur hann trivist ógvuliga væl, og hann gjørdi seinni av at taka útbúgving sum statsautoriseraður grannskoðari samstundis sum hann røkti starvið sum grannskoðari.



*Klaus Rasmussen skal nú royna nýggjar leiðir á flatlondum, og fer tí frá sum stjóri í Rasmussen & Weihe, samstundis sum hann selur fyritøkuna til starvsfólkið*

Tá henda útbúgving varð lokin í 1993, gjørdist hann partnari og samstundis eisini stjóri saman við C. W. Weihe. Og tá hesin so andaðist í 1995, gjørdist Klaus einsamallur stjóri í fyritøkuni.

### Starvsfólk eiga

Klaus Rasmussen sigur, at hansara aðalmál hevur altíð verið, at har hann er, er hann fult og heilt, og tí er tað púra náttúrligt, at nú hann fer frá Rasmussen & Weihe, so fer hann fult og heilt. Og tað merkir, at hann valdi at selja fyritøkuna til starvsfólkið, sum fer at reka hana víðari.

Nýggi stjórin, Hans Laksá, sigur, at hann, saman við starvsfólkunum, sum í dag eru um tey 30 í tali, fara at reka fyritøkuna eftir sama leisti sum higartil. Spurdur, um tey, nú Klaus Rasmussen er farin úr fyritøkuni, fara at broyta navnið á grannskoðaravirkinum. Men tað er ivasamt.

– Vit hava ikki tosað um hetta enn. Tað hevur verið so nógv at tikist við í seinastuni, at vit ikki rættiliga hava havt stundir at umrøtt eitt navnaskifti. Men navnið er eftirhondini rættiliga kent millum fólk, so tað verður í hvussu er ikki her og nú, at tað verður broytt, sigur Hans Laksá, sum tekur við stjórastarvinum 1. juli, tá Klaus Rasmussen fer frá.

Rasmussen & Weihe hava annars móttøku í sambandi viðstjóraskiftið fríggjadagin millum klokkan 15 og 18.